Hoyringsskriv

31/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk)

Við hesum skrivi vil eg staðiliga mæla frá, at lógaruppskotið verður samtykt. Lógaruppskotið er ikki í samsvari við tær altjóða skyldir, ið Føroyar hava, samsvarar ikki við brekpolitikk landsins, og grundgevingarnar fyri, hví lógaruppskotið er neyðugt, hanga ikki saman við tí, ið Føroya Løgting fyrr hevur samtykt. Harumframt eru menniskjansligu avleiðingarnar stórar fyri tey, ið verða rakt, og sparingarnar lítlar.

Tá Føroya Løgting 05/07/2017 samtykti at betra um skipanina fyri tillagaði størv, og munandi økja um lønina, ið fólk í skipanini fingu, var uppskotið einmælt samtykt. Viðmerkingarnar til lógaruppskotið tá vístu eitt nú á, at broytingarnar vórðu gjørdar við tí fyri eyga, at fáa fleiri fólk í skipanina. Viðmerkingarnar vísa á gagnligu avleiðingarnar, ið lógaruppskotið fór at hava, men vístu eisini á at:

Metingin leggur ikki upp fyri, at talið av persónum í tillagaðum starvi væntandi fer at økjast komandi árini, og at nýggju málini í miðal væntandi verða dýrari enn við verandi skipan, og tí væntast útreiðslurnar at økjast meira, enn mett omanfyri.

Sostatt visti Føroya Løgting, tá lógarbroytingin bleiv samtykt, at útreiðslurnar fóru at vaksa. Ein beinleiðis avleiðing av, at lógaruppskotið fór at hava teirri ávirkan, ið ynskið var, var júst at útreiðslurnar fóru at vaksa meira, enn ein roknaði við. Kortini samtykti eitt samt Løgting uppskotið, eftir at ein samd trivnaðarnevnd mælti til at samtykkja tað. Trý núverandi landsstýrisfólk vóru limir í nevndini, íroknað landsstýriskvinnan í Almannamálum.

Tí gevur tað lítla meining nú at spara, tí at broytingin júst riggaði, sum ein tá ynskti, at hon skuldi. Somuleiðis eru sparingarnar, av at færri fólk eru fyritíðarpensiónistar, ikki lýstar í lógaruppskotinum - eins og gagnligu avleiðingarnar á kropsliga- og sálarheilsu hjá teimum, ið sleppa í tillagað starv, ikki er lýstar, eins og virðini tey skapa til samfelagið við sínum arbeiðsinnsatsi, tó at hesar sparingarnar helst eru serstakliga stórar.

Hoyring er krav

Tá um ræður viðurskifti hjá teimum, sum bera brek, so er krav um hoyring av lógaruppskotum. Føroyar hava bundið seg til at virða rættin hjá teimum, sum bera brek í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek. Har er staðfest ikki minni enn tríggjar ferðir, at tey, ið bera brek, eiga at verða tikin við uppá ráð - serliga tá lógarbroytingar ávirka tey. Tískil er tað serliga átaluvert, at hetta lógaruppskotið ikki er sent til hoyring.

Í fororðinum á síðu 1 verður staðfest:

(f) viðurkenna týdningin í aðalreglum og leiðreglum … ið bera brek, at vera við til at fáa fram, orða og eftirmeta politikk, ætlanir, tiltøk og virksemi á lands-, økis- og altjóða stigi, sum virka fyri at javnseta møguleikar hjá fólki, ið bera brek,

Á síðu 2 verður staðfest:

(o) hugsa um, at fólk, ið bera brek, eiga at fáa høvið sjálv at verða við í arbeiði, tá ið avgerðir verða tiknar um leiðreglur og skipanir, ikki minst teimum, sum beinleiðis viðvíkja teimum,

Og úr grein 5 í sáttmálanum:

Tá ið lóggáva og mannagongdir verða evnaðar til, sum seta í verk henda sáttmála og í øðrum avgerðartilgongdum um viðurskifti, sum víkja at fólki, ið bera brek, skulu limalondini leita sær ráð hjá fólki, ið bera brek, og taka tey við í arbeiðið...

At ikki senda hetta lógaruppskotið til hoyring, er sostatt serliga átaluvert. Ikki bara tí at tað er brot á ein altjóða sáttmála, ið Føroyar hava bundið seg til, men eisini vegna tað, sum liggur aftanfyri ásetingina í sáttmálanum. Fólk í tillagaðum størvum eru júst í tillagaðum størvum, tí tey hava niðursetta arbeiðsorku. Sostatt er tað ósannlíkt, at tey hava somu orku, at gera vart við, hvussu eitt lógaruppskot sum hetta ávirkar tey. Tá áliggur tað politisku myndugleikunum at tryggja, at tey verða hoyrd.

Krav um somu løn

Lógaruppskotið er hvørki í tráð við ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek, við frágreiðingina Føroyar sendu til ST í sambandi við sáttmálan, andan í Løgtingslóg nr. 63 frá 26. Juni 2011, ella brekpolitisku grundreglur landsins. Kravið og málið í øllum keldunum er greitt - fólk, sum bera brek, eiga ikki at verða revsaði fíggjarliga, tí tey hava brek. Tey eiga at fáa somu løn, sum fólk, ið hava eitt tilsvarandi starv, og ikki bera brek. Sjálvt við núverandi reglum kring tillagað starv verður hetta krav ikki uppfylt hjá fólki, sum hava sterkt niðursettan arbeiðsførleika og hava størv, sum krevja hægri útbúgving. Tey fáa sum er upp til 16.000 krónur minni um mánaðin enn tey, sum hava samsvarandi størv - og við hesum lógaruppskotinum fara tey niður á at fáa 18.000 krónur minni um mánaðin. Eina og aleina tí tey hava eitt brek. Ikki nokk við tí, eisini tey, sum hava minni víðfevnd brek, skulu nú eisini koyrast munandi niður í løn, um tey fáa eitt nýtt starv, eina og aleina tí tey bera brek.

Brekpolitisku grundreglur landsins staðfesta á síðu 6:

Grundreglan um samhaldsfesti er ikki bert ein brekpolitisk grundregla, men er ein almennvælferðarpolitisk grundregla. Grundreglan um samhaldsfesti verður tó tikin við, tí henda grundreglan heldur fast um megin regluna um kompensasjón sum ein fyriskipan um javnlíkar møguleikar - og ikki sum ein tørvsmett fyriskipan. Uttan mun til, um tann, ið ber brek, er ríkur ella fátækur, so tørvar viðkomandi kompensasjón fyri at hava sama útgangsstøði sum onnur.

Altso - brekið eigur ikki at ávirka møguleikarnar hjá teimum, sum bera brek. Fólk við breki eiga at hava sama útgangsstøði sum onnur - tey eiga at fáa somu løn, fyri sama arbeiðið. Bæði ætlanin um at lækka loftið á ískoytinum og at mótrokna eru í stríð við hesa grundreglu.

ST sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, bindir londini í grein 27 b at:

verja rættin hjá fólki, sum bera brek, til - á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, har í millum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði…

Síða 7 í frágreiðingin frá Føroyum til ST í sambandi við sáttmálan staðfestir víðari at í Føroyum:

... er ikki loyvt at gera mismun á ... lønar-og setanartreytir.

Løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki staðfestir somuleiðis í § 2:

Stk. 2.Tað er mismunur viðvíkjandi lønartreytum, um tað ikki verður veitt sama løn fyri sama arbeiði...

Altso - aftur her eru ætlaðu lógarbroytingarnar ikki í samsvar við tað, sum longu er galdandi í Føroyum. Fólk, sum bera brek, eiga at fáa somu løn sum fólk, ið ikki bera brek. Somuleiðis eiga tey at hava somu setanartreytir, og ískoytið frá tí almenna eigur tískil framhaldandi at fylgja sama vøkstri, sum sáttmálarnir hava, og stuðla uppundir, at tey fáa fulla løn.

Somu møguleikar og virðing

Tað er tó ikki bara ítøkiligu broytingarnar í lógaruppskotinum, sum ikki eru í samsvari við galdandi rættarstøðu í Føroyum. Avleiðingarnar av lógaruppskotinum eru eisini eitt stórt afturstig, í mun til teir tankar um møguleikar og virðing, sum politisku myndugleikarnar fyrr hava staðfest.

Í viðmerkingum til ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek, staðfesti Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, á síðu 5 at:

Harumframt snýr sáttmálin seg eisini um at ala fram ein hugburð, sum virðir rættin hjá teimum, ið bera brek.

Í høvuðsheitum kann sigast, at tað áliggur landsmyndugleikum, kommunum, frítíðarfeløgum og øðrum, ið varða av ymsu átøkunum, at bera so í bandi, at fólk, ið bera brek, kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur.

Hugburðurin, sum ein vildi ala fram við sáttmálanum, sæst ikki aftur í lógaruppskotinum. Tey, sum bera brek, hava fingið tey rættindini, sum tey hava. Við ætlaðu broytingunum missa tey longu galdandi rættindi - og tað í ein so mikið stóran mun, at tey við lægst arbeiðsførleika missa upp til 25.000 krónur um árið, og tey, sum hava hægri arbeiðsførleika, og størv, sum annars eru væl lønt hjá fólki, ið ikki bera brek, kunnu missa meira enn 100.000 krónur um árið. Eina og aleina tí tey bera brek. Hetta er ikki nakað, sum ber so í bandi, at fólk, ið bera brek, kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur.

Fororðini til ST sáttmálan staðfesta eitt nú:

(n) viðurkenna týdningin, tað hevur fyri fólk, ið bera brek, at tey ráða sær, eru óheft og hava frælsið at taka egnar avgerðir,

(q) viðurkenna, at kvinnur og gentur, ið bera brek, ofta eru í størri vanda fyri harðskapi, løsti, misnýtslu og vanrøkt, ringari viðferð ella eyðræning, innanhýsis sum uttanhýsis,

Tað er tíverri ein sannroynd, at fólk, sum bera brek, í munandi størri mun enn onnur uppliva harðskap, misnýtslu og vanrøkt. Serliga tá um ræður kvinnur. Hetta er staðfest kring allan heim, og tað er eingin orsøk at rokna við, at støðan er øðrvísi í Føroyum. Ein grundleggjandi fortreyt fyri, at fólk, sum bera brek, kunnu verja seg móti misnýtslu og harðskapi, er at tey á teirri einu síðuni eru fíggjarliga sjálvbjargin, og á hini síðuni, at tey hava sambond við fólk uttanfyri heimið. Skipanin við tillagaðum størvum tryggjar í stóran mun hetta hjá teimum, sum eru fevnd av henni. Tað ger hon tó í minni mun við hesum broytingum. Tað verður torførari hjá t.d. eini mammu, sum ber brek, at tryggja seg sjálva og børn síni fíggjarliga, og tískil verður hon meira bundin at makanum. At skipanin verður minni lokkandi ger tað eisini meira sannlíkt, at fólk velja at gerast fyritíðarpensiónistar, og tískil ikki fáa sosiala netverkið, sum liggur í at hava eitt starv.

Útbúgving

Útbúgving er ikki bara ein rættur, tað er eisini staðfest í hópin av kanningum, at tað at nema sær útbúgving er gott fyri bæði kropsliga og sálarliga heilsu. Tí eigur ein at eggja og stuðla fólki, ið bera brek, at nema sær víðari útbúgving. Vit hava sum er fleiri skipanir, ið gera hetta. Tó at har eru nógv dømi um, at tær skipanirnar kunnu betrast og víðkast, so er tað longu nakað vit gera. Og tað at vit gera tað, er eisini í tráð við ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek.

Grein 26 í sáttmálanum staðfesti eitt nú:

1. *Limalondini skulu taka munadygg og hóskandi stig, har í millum stuðul frá javnlíkum, til tess at gera fólk, ið bera brek, før fyri at vinna sær og varðveita størst møguligt sjálvræði, fullan likamligan, sálarligan, sosialan og vinnuligan førleika og fullvegis part og luttøku í øllum lívsins viðurskiftum. Til at røkka hesum máli skulu limalondini skipa, styrkja og víðka*

víðfevndar menningar- og endurmenningartænastur og skipanir, serstakliga á heilsu-, starvs-, útbúgvingar- og almannaøkinum á slíkan hátt, at hesar tænastur og skipanir:

Hetta er tó ikki nakað, sum ætlaða broytingin á nakran hátt stuðlar. Skulu fólk, sum bera brek, verða eggjaði at nema sær útbúgving, so mugu tey eisini fáa eina gularót fyri tað. At tað vegna ætlaðu mótrokningina skal vera beinleiðis ógjørligt at vera í tillagaðum starvi, og fáa tilsvarandi løn sum møguligir akademiskir starvsfelagar, ger tað so avgjørt ikki. Og tá um ræður tey, sum hava sterkt niðursettan arbeiðsførleika, so er tað longu galdandi, at tað fíggjarliga ikki loysir seg at fáa hægri útbúgving. Loftið á 22.000 krónur merkir, at um ein persónur, við 10% arbeiðsførleika, so kemur upp á hægsta stigið hjá AKF, so fær viðkomandi ongantíð so nógv meira enn 26.000 krónur um mánaðin. Tað er 16.000 krónur minni enn ein, sum ikki hevur brek. Við ætlaðu broytingini veksur hesin munurin upp til 18.000 krónur. Persónurin kann tískil ongantíð so mikið sum vinna tað inn aftur, sum viðkomandi misti, av ikki at arbeiða tey árini tað tók, at vinna sær útbúgvingina. Hví skal ein, sum antin hevur ella veit at viðkomandi fer at fáa sterkt niðursettan arbeiðsførleika, tá fara at lesa? Og hví skal viðkomandi revsast fyri brek sítt?

Fakfelagsrættindi

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2021 verður tað víst á, at tað at ískoytið ikki longur fylgir sáttmálunum, ið fólk eru sett sambært, merkir, at rætturin til sáttmálaløn dettur burtur. Hetta er beinleiðis í stríð við ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek. Har verður sólargreitt staðfest í grein 27, at lond skulu:

c. tryggja, at fólk, ið bera brek, eru før fyri at gagnnýta síni arbeiðs- og fakfelags rættindi á jøvnum føti við onnur.

Rætturin til støðugt betrandi kor

Somuleiðis er broytingin greitt brot á grein 28 í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek. Sáttmálin staðfestir:

1. Limalondini viðurkenna, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor, bæði fyri seg sjálv og familjur teirra, hetta merkir eisini at hava ... rætt til støðugt bøtt lívskor...

Hendan lógarbroytingin er ein ógvuslig broyting til tað verra, tá um ræður lívskor teirra, ið bera brek. At missa t.d. 2.100 krónur av 26.000 krónum er ein lønarlækking, frá einum mánaði til annan, á 8%. Broytingin er so mikið stór, at hon kann gera tað munandi verri, at rinda t.d. lán og rokningar, sum fólk hava fingið út frá teimum fortreytum, sum tey liva undir nú. Fyri ikki at tosa um, um ein verður noyddur at skifta starv, og kann missa upp til 9.000 krónur frá einum degi til annan vegna mótrokningar.

Økta talið av fólki í skipanini:

At enda so staðfestu viðmerkingarnar í september 2014, frá ST nevndini, ið kannar rættindi teirra sum bera brek í mun til grein 27 í ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek, at:

...

Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur øll neyðug stig til at økja nógv og skjótast til ber prosentið av fólki, ið bera brek, sum virka á opna arbeiðsmarknaðinum, eisini broyting í almennu arbeiðslóggávuni, soleiðis at hon setur arbeiðsgevarum greið krøv at veita starvsfólki, sum bera brek, rímiligar tillagingar.

Og tað er júst hetta sum er hent. Føroyar hava tikið stór stig á røttu kós, tá um ræður at økja um talið av fólkum, sum hava tillagað starv. Tað er ein sólskinssøga. Um nakað, so skuldi ein lagt seg eftir, at betra um skipanina hjá teimum, sum hava sterkt niðursettan arbeiðsførleika, heldur enn at gera skipanina verri hjá øllum.

At seta sær fyri, at spara so lutfalsliga lítið sum hetta, tí at fleiri fólk eru komin í skipanina, er í ógvuliga stórari andsøgn við allan tann brekpolitikk, sum Føroyar hava ført fram til í dag – óansæð hvørjir flokkar hava sitið í samgongu. Tað er ikki bara skeivt í mun til tað, sum Føroyar hava bundið seg til, tað er eisini skeivt reint menniskjansliga, og er eitt ógvuliga óheppið signal at senda. Vit eiga at siga: “Sjálvandi vilja vit hava tykkum á arbeiðsmarknaðinum, og virðismeta tykkum eins og øll onnur.” Ikki: “Vit meintu tað ikki ordiliga, at tit skuldu koma út á arbeiðsmarknaðin. Kostar ov nógv. Tíverri.”

Við vón um vælvild

Regin Berg, avvarðandi og Master of Arts í politikki og altjóða politikki og Master í lóg